gult cyan magenta svart



## DAGSINS MEINING

# Arvasilvurið hjá Høgna

Undan seinasta løgtingsvali var ein sendirøð í SvF um bankamálið. Henda »krimirøð«, sum Høgni Hoydal sjónvarpsmaður stóð á odda fyri, fekk nógva umrøðu millum manna, og hatrið til danir stóð í besta blóma. Niðurstøðan var greið: danir høvdu við vilja lumpað føroyingar at keypa eina deyða virðisleysa hønu, ið nevndist Føroya Banki, og sannleikin um hetta sminkaða líkið kom ikki fram fyrr enn eftir at partabrævaumbýtið varð framt.

At bankamálið frá danskari síðu kundi verið handfarið hepnari er ein sannroynd. Men hvussu væl var málið lýst í sjónvarpssendingini? Jú! Brádliga vaknaði »virðisleysa« hønan úr dvala og fór at verpa, og betri verpingarhønu hevur landskassin ongantíð átt. Í beinleiðis skatti og vinningsbýti eru 100 tals milliónir frá »deyðu« hønuni runnið niður í gjaldføri landskassans, umframt at eginognin hjá »hønuni« er økt munandi. Eginpeningsavkastið hjá bankanum er tað hægsta hjá peningastovnum í ríkinum. Tað skemtiliga við hesum er, at ævintýrið um ta deyðu hønuna gjørdist stjørnuskotið til eina politiska karrieru hjá sjónvarpsmanninum.

Í hesum døgum leitar landsstýrið eftir peningi til skiftisgrunn at fíggja fullveldið. Trupulleiki landsstýrisins er, at tá lógásetta gjaldføri landsbankans er frádrigið, er alt ov lítið av tøkum peningi eftir til nakran skiftisgrunn. Men landsstýrið veit ráðini. Almennar ognir skulu lýsast til sølu, herundir virðisbrøv í vinnufyritøkum. Virðið verður mett at vera yvir 3.000 milliónir. Her er bæði Føroya Tele, Realurin, JFK Trol osfr. Men flaggskipið og virðismesta aktivið, ið landsstýrið reypar av at eiga, er »deyða« hønan hjá Hoydal. Mett verður, at partabrøv bankans hava eitt virði uppá millum 1.500 og 2.000 mill. Deyða hønan í herferðini móti dønum í SvF fyri nøkrum árum síðani, er sum fuglurin Føniks reistur úr øskuni og er nú prýðiligasti arvur landskassans, nú arvasilvurið skal seljast til tess at fíggja fullveldið..

Kønir menn meta í dag, at fyri føroyska búskapin fekk bankamálið eina sunna loysn. Samanleggingin av Føroya Banka og Sjóvinnubankanum førdi til rationaliseringar innan peningaheimin í Føroyum, og tað trongdi harðliga til. Hetta hevur eisini ført til lægri útlánsrentu, sum føroyski búskapurin hevur notið gott av. Men niðurstøða sjónvarpmansins í bankasendingini um, at danir høvdu lumpað virðisleysar ognir inn á landskassan, var heilt burturvið – hetta er ein sannroynd í dag. Men fyri varaløgmann er tað óivað ein fyrimunur, at mong eru stuttmint og ikki minnast innihaldið í sendingini.

Søgan um ta deyðu hønuna kundi verið tikin úr einum H. C. Andersen ævintýri. Tann ljóti dunnuungin (les Føroya Banki) frá sjónvarpssendingini hjá Høgna Hoydal, er nú ein prýðiligur svani í tí arvasilvuri, sum skal fíggja loysingina hjá sama manni.

Men skulu 1000 tals milliónir fáast fyri arvasilvurið, verður tað ikki kapitalur í Føroyum, sum keypir. Landsstýrið fær kanska ikki trupulleikar at finna keyparar uttanlands. Men hetta fær sanniliga avleiðingar fyri føroyskan búskap. Fara útlendingar at seta seg á stórar partar av føroysku vinnuni, so verður tað við kapitalavkasti fyri eyga. Vinningsbýtið fer tá óskattað av landinum, av tí at sambært dupultskattaavtalur, ið Føroyar hava gjørt við fleiri lond, verður vinningsbýtið bert skattað í móttakaralandinum. Konsolideringin í føroyskum vinnulívi kann sostatt drenast av landinum, meðan landsstýrið sleppur bert at hyggja at.

»Evsta vald« hjá Hoydal minnir mest um at avreiða P/F Fullveldið Føroyar til tann útlendska íleggjara, ið bjóðar hægst. Øll eru vit greið um, at fíggjarligt frælsi er ein fyritreyt fyri politiskum frælsi. Arvasilvurið kann bert seljast einaferð, og sum hjá kellingini á sinni, so kann hetta gerast ein stokkutur hiti.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

**Sámal Petur í Grund landsstýrismaður**



Í gjár tók Sámal Petur í Gund við sum landsstýrismaður, eftir at Helena Dam á Neystabø mátti siga seg úr starvinum, tí løgfrøðisliga kanningin hjá Løgdeildini í Tinganesi vísti, at hon ikki hevði handfarið pensjónsmálið á rættan hátt.

Sámal Petur í Grund hevur fyrr verið landsstýrismaður. Tað var í samgonguni millum Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin, Sjálvstýrisflokkin og Verkamannafylkingina eftir valið í juli 1994, at hann gjørdist landsstýrismaður í m. a. samferðslu- og mentamálum.

Sámal Petur í Grund er 42 ára gamlal. Hann er sonur Mariu og Martin í Grund í Søldarfirði, og hann er útbúgvin elektromekanikari í 1980 og fiskiskipari í 1994.

Hann starvaðist sum mekanikari á fabrikstrolara 1979-85, sum trúboðari frá 1986-91 og var sjómaður frá 1991-93.

Hann sat sum landsstýrismaður til desember 1997, tá Edmund Joensen, táverandi løgmaður koyrdi hann úr starvi vegna politiska ósemju.

Við seinasta løgtingsval 30. apríl 1998 varð Sámal Petur í Grund valdur á ting fyri Sjálvstýrisflokkin í Eysturoyar valdømi, og nú hann tekur við sum landsstýrismaður, má hann sambært stýrisskipanarlógini leggja tingsessin frá sær. Í hansara stað á tingi kemur Kári P. Højgaard.

Nú Helena Dam á Neystabø er farin frá sum landsstýriskvinna, tekur hon aftur við starvinum sum løgtingskvinna, og tí má Jákup Sverri Kass víkja sæti á tingi.

Jákup Sverri Kass var bara 21 ára gamal, tá hann tók við sum tingmaður, og er hann helst yngsti maður, sum hevur havt fast sæti á tingi.

Sostatt er øll tingmanning Sjálvstýrisfloksins skift út vegna tess, at Helena Dam á Neystabø fór frá sum landsstýriskvinna.

# Børnini í fjøruni

BÓKAÚTGÁVA
*Føroya Skúlabókagrunnur*

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út bókina Børnini í fjøruni, sum Johan Joensen, lærari á Tvøroyri, hevur skrivað.

Søgan er um tey bæði Áslu og Jón, ið fara oman í fjøruna at spæla. Hetta er ein góðan summardag. Niðri í fjøruni uppliva tey so mangt. Nógv er at síggja. Flogkykt og skriðkykt. Okkurt svimur úti á fjørðinum nær landi. Hvat man tað vera?

Sum vera man, fara tey eisini at vassa.

Onnur børn eru eisini í fjøruni. Ein drongur er farin at svimja og er komin nakað langt úr landi. Dugir ikki nóg væl at svimja og er komin í neyð. Tíbetur er pápi Áslu komin oman á bakkan at hyggja eftir dóttrini. Hann hoyrir neyðarróp og loypur útí at bjarga dreinginum. Alt spælir væl av.

"Børnini í fjøruni" er ein Snípubók. Føroya Skúlabókagrunnur og Bókadeild Føroya Lærarafelags samstarva um útgávuna av Snípubókunum. Snípurnar eru lættlesibøkur. Henda bókin er gul við trimum fjaðrum og er ætlað børnum í 2. og 3. flokki.

"Børnini í fjøruni" er 28 blaðsíður við myndum. Olivur við Neyst teknaði myndirnar og permuna í litum. Hestprent hevur prentað. Bókin kostar 36,- kr.




# Kommunudeild sett á stovn

Tíðindaskriv
*Løgmansskrivstovan*

Løgmaður hevur nú savnað alla tað kommunalu umsitingina á einum stað. Hetta er gjørt við, at ein kommunudeild er stovnsett á Løgmansskrivstovuni.

Kommunudeildin fær ábyrgd av kommunustýrislógini og kunngerðum við heimild í henni. Eisini verður Landsfólkayvirlitið lagt til kommunudeildina. Harumframt fær kommunudeildin ábyrgd av at skipa og leiða tað framhaldandi arbeiðið við at umskipa tað kommunala øki.

Hilmar Høgenni er settur sum deildarleiðari, hann er útbúgvin cand. polit. og hevur síðani á heysti 1999 arbeitt sum ráðgevi í kommunumálum á Løgmanskrivstovuni. Áðrenn starvaðist hann í 5 ár sum umsitingarleiðari á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 348mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Stríðshugað felag 40 ár

**– Vit skulu í størri mun gera okkum galdandi í samfelagskjakinum og skapa fortreytir, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum**

FØÐINGARDAGUR
*Turið Kjølbro*



*Á móttøkuni hjhá Starvsmannafelagnum fríggjadagin, í sambandi við, at felagið hevði 40 ár á baki*

*Mynd. Jens Kristian Vang*

Fríggjadagin hevði Starvsmannafelagið 40 ár á baki. Upprunaliga var Starvsmannafelagið partur av Starvs- og tænastumannafelagnum, men fór burtur úr undir einum fakligum stríði fyri júst 40 árum síðani.

Starvsmannafelagið, ið er eitt av størstu fakfeløgunum í landinum við 1700 limum, hevur vunnið nógvar sigrar hesi nógvu farnu árini.

– Alt sum ber á rætta borðið eru sigrar, stórir sum smáir. Hinvegin hevur felagið eisini fingið nógvar frammaná. At limirnir vórðu noyddur at ganga við til at fara niður í løn fyrst í nítiárunum, var ein herskin biti hjá fakfeløgunum at slúka. Stríðið, vit fóru útí í 1999, var eitt rættiliga markant stríð. Vit mettu okkum at vera rættliga væl fyri og høvdu ein greiðan boðskap, hóast úrslitið ikki var nøktandi. Í stríðnum settu vit hol á nógv viðurskifti, sum legði støðið í samfelagnum. Eitt nú stríddust vit fyri at fáa lægstu lønirnar eitt kvink upp, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður felagsins.

Framhaldandi at vera við at mynda samfelagið eru høvuðsvisjónirnar hjá felagnum.

– At vera við at skapa eitt sunt samfelag og eina sunna umsiting á øllum økinum, har fólk fáa tær ábøtur, sum eru neyðugar. Ikki minst at vera við til at taka stríðið upp saman við teimum kreftum, sum vilja at samfelagið skal broytast munandi. Skal tað broytast, skulu vit vera við í arbeiðinum. Eisini er av týdningi at finna eitt tættari samstarv millum fakfeløgini og umsitingina. Umsitingin, vit hava í dag, er rættliga tung og stirvin. Tosa vit um tað almenna liggja sáttmálaviðurskiftini á einum staði og starvsfólkaviðurskifti á einum øðrum. Tað ger tað rættiliga trupult at arbeiða. Eitt aðalmál hjá okkum er at fáa tað at hanga meiri saman.

– Vit skulu í størri mun gera okkum galdandi í samfelagskjakinum, skapa fortreytir, eisini innanhýsis hjá






Hendir okkurt, sum er áhugvert hjá øðrum at vita, eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota bilinum við eyðkendu frámerkjunum.

Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið. Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20. Telefax nr. 31 47 20.

Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr. 42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07. Eisini ber til at senda teldupost til:

edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo

Tíðindablaðið sosialurin


# Nógv hálka



*Vegirnir hava verið sera hálir seinastu dagarnir. Hósdagin seinnapartin fór hesin bilurin útav Hvítanesvegnum. Ongin skaði hendi, men ógvusligt sá tað út. Nú boða veðurmenninir frá líggjari veðri, so tað gongur eisini útyvir ferðsluna inni í Havnini, har ikki verður grivið allastaðni.*
*je*